Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 28.11.2019 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:: Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen
Árni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Tollakur Joensen
Hans Mourits Foldbo
Gudny Langgaard
Uni Rasmussen
Hanna Jensen

Vara limir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Erik Lervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
| --- | --- | --- | --- |
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 78/19 | 19/00537-1 | Tilmæli - Fíggjarætlan 2020 | 3 |
| 79/19 | 19/00561-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 19/00561 - Umbøn um eykajáttan til konto 320 – børn við serligum tørvi | 5 |
| 80/19 | 19/00573-3 | Mál 19/00573 Val av limi og varalimi í stýrið fyri Framvit. Málslýsing og tilmæli | 7 |
| 81/19 | 19/00602-2 | Fra´greiðing og tilmæli til mál 17/00343 | 8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 82/19 | 19/00604-1 | Tilmæli - Parkeringsøki á 339h í leirvík | 9 |
| 83/19 | 19/00624-2 | Tilmæli - Serstøk byggisamtykt til Fløtugerði í Leirvík | 10 |
| | | | |

# <u>78/19 Tilmæli - Fíggjarætlan 2020</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.09.2019 | 61/19 | 19/00537-1 |
| 2 Býráðið | 30.09.2019 | 68/19 | 19/00537-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.11.2019 | 68/19 | 19/00537-1 |
| 4 Býráðið | 28.11.2019 | 78/19 | 19/00537-1 |

**Málslýsing:**

Víst verður til hjál. tilfar frá umsitingini.

**Ískoyti 25/11-19**
Uppskot frá fíggjarnevndin til 2. viðgerð verður tøkt til fundin.

**Ískoyti 28/11-19**
Uppskot til fíggjarætlan frá felags fundi um fíggjarætlanina tann 27/11-19 fyriliggur og hevur hesi høvuðstøl:

| | |
|---|---|
| Inntøkur | 118.216.000 kr. |
| Rakstrarútreiðslur | 93.551.000 kr. |
| Løgur | 57.085.000 kr. |
| Rentuútreiðslur | 1.045.000 kr. |
| Útreiðslur til rentustuðul | 1.300.000 kr. |
| **RLÚ** | **- 34.765.000 kr.** |
| Avdráttir | 4.360.000 kr. |
| **Úrslit eftir rentir og avdráttir** | **- 39.125.000 kr.** |

Hallið á 39,1 mió. kr. verður fíggjað við 25 mió. kr í lántøku og 14,1 mió. kr verður tikið av innistandandi.

Skattaprosenti verður 21 og barnafrádrátturin verður 8.000,00 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan verður beint í føstu nevndinar til víðari viðgerð.

**Ískoyti 28/11-19**
Víst verður til uppskot til fíggjarætlan frá felags fundi tann 27/11-19

**Viðtøka Fíggjarnevnd 25. september 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð

**Viðtøka Býráðið 30. september 2019**
Einmælt samtykt at taka at beina málið í føstu nevndinar til víðari viðgerð.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 26. november 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan dagfest 26/11-19

**Viðtøka Býráðið 28. november 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan.

## 79/19 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 19/00561 - Umbøn um eykajáttan til konto 320 – børn við serligum tørvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 14.10.2019 | 12/19 | 19/00561-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.10.2019 | 65/19 | 19/00561-1 |
| 3 Býráðið | 31.10.2019 | 76/19 | 19/00561-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 26.11.2019 | 66/19 | 19/00561-1 |
| 5 Býráðið | 28.11.2019 | 79/19 | 19/00561-1 |

**Málslýsing:**

Vit koma at hava ein munandi meirnýtslu á konto *320 – børn við serligum tørvi* enn avsett er á fíggjarætlanini 2019

Á fíggjarætlanini 2019 er avsettar kr. 400.000 á nevndu konto. Vit hava havt rímiliga stórar avbjóðingar fyrra hálvár, í mun til børn við serligum tørvi – bæði á Gjáa og Brúsa. Umframt hetta, so eru nakrir tímar eisini játtaðir til børn við serligum tørvi í ganga í Skúlaspíranum og Frítíðarheiminum.

Hetta hevur gjørt, at vit hava brúkt fram til ultimo september kr. 455.146,10 av teimum játtaðu kr. 400.000
Eftir summarferiuna hevur tað víst seg, at vit hava fingið enn fleiri børn inn, sum hava serligan tørv og hevur hetta sostatt viðført, at við havi fingið eina munandi meirútreiðslu á konto 320 – *børn við serligum tørvi* .

Tørvur er á eini eykajáttan á kr. 400.000

| | |
|---|---|
| **Ætlan 2019** | kr. 400.000,00 |
| Brúkt sept 2019 | kr. 455.146,10 |
| Meirnýtsla | kr. 55.146,10 |
| Væntað forbrúk oktober, november og desember 2019 | kr. 342.777,85 |
| | |
| **Mett eykajáttan** | **397.923,95** |

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at eykajáttan verður gjørd á kr. 400.000

**Viðtøka Trivnaðarnevndin 14. oktober 2019**
Trivnaðarnevndin mælir til at eykajáttan verður gjørd á kr. 400.000

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. oktober 2019**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini

**Viðtøka Býráðið 31. oktober 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini. Peningurin verður tikin av innistandandi.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 26. november 2019**
Mælt verður til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. Viðgerð.

**Viðtøka Býráðið 28. november 2019**
Einmælt samtykt eins og við 1. Viðgerð.

## 80/19 Mál 19/00573 Val av limi og varalimi í stýrið fyri Framvit. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.11.2019 | 75/19 | 19/00573-3 |
| 2 Býráðið | 28.11.2019 | 80/19 | 19/00573-3 |

**Málslýsing:**

Vísandi til § 5 í sáttmálanum um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu, skulu kommunurnar velja eitt stýrið fyri framvit. § 5 sigur fylgjandi:

**§ 5**

*Kommunurnar í skúlasamstarvinum velja eitt stýri fyri Framvit, sum umsitur fyrisiting og rakstur hjá Framviti.*
*Stýrið telur 4 limir. Skúlastjórin er skrivari hjá skúlasamstarvinum.*
*Limirnir verða valdir í millum kommunustýrislimirnar í luttakandi kommununum soleiðis:*
*Eysturkommuna: 2 limir, har annar er borgarstjórin.*
*Fuglafjarðar kommuna: 2 limir, har annar er borgarstjórin.*

*Samstundis velja kommunustýrini varalimir fyri hvønn limin.*
*Henda skipan kemur í gildi, tá ið sáttmálin um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu er góðkendur av landsstýrismanninum.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

### Viðtøka Mentanarnevndin 16. november 2019

Mentanarnevndin mælir til at Hans Mourits Foldbo verður limur og Hanna Jensen verður varalimur.

### Viðtøka Býráðið 28. november 2019

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentnarnevndini, og harumframt at velja Árna Jacobsen sum varalim fyri Jóhan Christiansen

## 81/19 Fra´greiðing og tilmæli til mál 17/00343

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.11.2019 | 81/19 | 19/00602-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Málið var viðgjørt í navnanevndini tann 23 oktober og mælir hon til fylgjandi:<br><br>• Høvuðsvegurin eitur “Fløtugerði. Smáu vegirnir til vinstru kunnu fáa sama navn.<br><br>• Fyrsti síðuvegur til høgru eitur “Áargeil”<br><br>• Næsti síðuvegur til høgru eitur “við Dvørgastein”<br><br>Viðmerking: Onnur nøvn til smáu vegirnar til vinstru kunnu koma upp á tal, tá útstykkingin verður gjørd. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Viðtøka Býráðið 30. oktober 2017**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini

**Viðtøka Býráðið 28. november 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

## 82/19 Tilmæli - Parkeringsøki á 339h í leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.11.2019 | 33/19 | 19/00604-1 |
| 2 Býráðið | 28.11.2019 | 82/19 | 19/00604-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tørvur verður á fleiri parkeringsøkjum í Fløtugerði í Leirvík.<br><br>Umsitingin hevur hugt uppá staðseting av parkeringsøki. Møguleiki er at gera parkeringsøki á matr. nr. 339h í Leirvík.<br>Matrikulin liggur í útstykkingini í Fløtugerði. Upprunaliga skuldi økið seljast sum grundstykki.<br><br>Økið er 399 m2, man kann gera parkeringspláss til áleið 15 -18 bilar á økinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kostnaðurin fyri at gera parkeringsøkið, er mettur til at kosta áleið 450.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at gera matr. nr. 339h í Leirvík til parkeringsøki. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 18. november 2019**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at leggja matr. nr. 339h í Leirvík av til parkeringsøki.

**Viðtøka Býráðið 28. november 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 83/19 Tilmæli - Serstøk byggisamtykt til Fløtugerði í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.11.2019 | 83/19 | 19/00624-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Økið í Fløtugerði í Leirvík skal hava eina serstaka byggisamtykt.<br><br>Ein serstøk byggisamtykt fyri økið er gjørd og tað er tinglýst saman við skeytinum, men býráði skal eisini samtykkja ásetingina.<br><br>Víst verður til "Skjal A" í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at broyta ásetingina fyri økið í Fløtugerði til tað, sum er lýst í "Skal A", dagfest 31.05.2018. |

**Viðtøka Býráðið 28. november 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

fundurin lokin kl. 17.30

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Hanna Jensen